# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframa grunn. Endamálið við Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrsins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi, umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð og ymiskar uppgávur fyri Vinnumálaráðið.

## Árið 2014

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla sølufremjan í útlondum, vinnulívsmenning, ferðavinnutænastum og kreativum vinnum í 2014.

Saman við Vinnumálaráðnum, fór Vinnuframi í 2014 undir eina verkætlan sum skuldi skapa heimsins bestu íverksetaraskipan í Føroyum. Verkætlanin bar heitið Innovatión Magnet og byrjaði 1. september 2014, Kristianna Winther Poulsen stóð fyri henni, í meðan ein stýrisbólkur við fimm fólkum úr vinnuni, frá Fróðskaparsetrinum, Vinnuhúsinum og Vinnumálaráðnum blivu sett at geva íblástur og fylgja arbeiðnum við Innovatión Magnet. Í stýrisbólkinum sita, Regin W. Dalgaard, Anna Borg Dahl, Bogi Bech Jensen, Birita Johansen og Niels Arge Galán. Jóhan Dahl, landstýrismaður í vinnumálum, hevur verið ambassadørur fyri verkætlanini, Regin W. Dalsgaard, formaður í Vinnuframa hevur havt høvuðsábyrgdina. Innovatión Magnet skal leggja lunnar undir eina nýggja skipan, so íverksetan verður raðfest høgt í samfelagnum. At finna nýggjar vinnuhættir, at finna uppá nýggjar loysnir og at skapa fleiri arbeiðspláss er avgerandi fyri vøkstur og menning í øllum samfelagsløgum, tí skal arbeiðast fram í móti teimum bestu korunum fyri íverksetan og íverksetarar. Verkætlanin Innovatión Magnet skal finna fram til heimsins bestu íverksetaraskipan.

Eins og undanfarna ár, verður raksturin støðugt tillagaður, soleiðis at umsitingin átekur sær meira ráðgevingaruppgávur, ið áður vórðu røktar av uttanhýsis ráðgevum. Við hesum leisti, metir stýrið, at stuðulin verður betri gangnnýttur til mennandi verkætlanir, samfelagnum at frama. Nýggja skipanin, har ið samskipari grunsins er eitt bindilið í millum stýrið og umsøkjaran, ger at umsøkjarin fær skjótari viðgerð og røttu ráðgevingina viðvíkjandi møguleikanum við tí góða hugskotinum.

Vinnuframi hevur í 2014 umsitið skipasmiðjustuðul, umframt invest.fo har m.a. spurningar verða svaraðir um fíggjarlig og skattlig viðuskifti í Føroyum.

Vinnuframi hevur havt ein aktivan leiklut í byggingini av Granskarasetrinum iNOVA, sum nú er liðug. Veruligur rakstur er komin í Granskarasetrið. Sambært løgtingslóg eru tól keypt til gransking fyri góðar 6,6 mió. kr. Nevnast kann, at seinasta íløgan er á góða hálva mió. kr. til tól innan ítróttargransking, sum

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

Magni Mohr frá Fróðskaparsetrinum brúkar til granskingarverkætlanir innan ítrótt og heilsu. Tað ber til hjá ítróttarfeløgum, og øðrum, at bíleggja royndir til ávís endamál.

iNOVA er eitt privat felag við 10 partaeigaranum. Avtala er gjørd millum Vinnuframa og iNOVA um at leiga bygningin, á Hoyvíksvegi 51, ókeypis í fimm ár, so felagið kann fáa gongd í virksemið, tískil fær Vinnuframi ongar leiguinntøkur hesi árini. Vinnuframi hevur ein nevndarlim í nevndini hjá iNOVA.

Rentuinntøkurnar vóru 327 tkr. í 2014 í mun til 414 tkr. í 2013.

Vinnuframi hevur í 2014 viðgjørt 68 umsóknir, søkt varð um 8.346 tkr., í stuðli vórðu veittar 3.721 tkr. brutto, meðan 965 tkr. vórðu afturførdar.

Eginognin við árslok var 44.197 tkr. harav er stovnfæið 22.879 tkr.

Við árslok 2014 var tøki peningurin 27.047 tkr., meðan játtaður ikki útgoldin stuðul var 3.442 tkr.

**Framtíðin**

Vinnuframi avgjørdi í 2013 at gera stuðulsskipanina einfaldari og 2014 var fyrsta árið stuðul varð veittur eftir hesi skipan. Skipanin bleiv broytt frá at hava 10 ymiskar stuðulsskipanir til fýra sum eru íverksetan, ráðgeving, menning og søla. Nýggja skipanin ger tað lættari hjá umsøkjararum at søkja stuðul frá Vinnuframa. Umsitingin kann tó samanbera nýggju og gomlu skipanirnar soleiðis, at munagóð hagtøl kunnu gerast.

Í 2014 varð dentur lagdur á at játta stuðul til menning av nýggjum vørum og sølufremjandi tiltøkum og verður í 2015 arbeitt støðugt við at Vinnuframi skal gerast meira sjónligur og brúkaravinarligur í 2015.

Afturat høvuðsvirkseminum, sum er at stuðla tí góða hugskotinum, átekur Vinnuframi sær uppgávur fyri Vinnumálaráðið við m.a. at umsita Invest.fo. Vinnuframi hevur eisini ein aktivan leiklut í Horizon 2020 fyri SME (small and medium-sized enterprises), tí føroyski atlimaskapurin í EU gevur føroyskum fyritøkum og stovnum møguleika at søkja um stuðul úr hesari skipan, Vinnuframi kunnar fyritøkum um henda møguleika, og stýrið fyri Vinnuframa kann eisini játta fyritøkum og stovnum stuðul at skriva hesar umsóknir.

Fyri at tryggja eina samanhangandi og streymlinjaða íverksetaraskipan hevur Vinnuframi fingið til uppgávu at gera avtalu við Íverksetarahúsið í Klaksvík um virksemið fyri árið.

Vinnuframi fekk í 2014 met tal av umsóknum, tá inn komu 68, av hesum blivu játtaðar 47. Játtanin hjá Vinnuframa á 3,2 mió. kr. fylgir ikki við gongdini og tískil gongur hetta útyvir verkætlanir, sum stýrið fyri Vinnuframa metir vera stuðulsverdar.

Niðanfyri er lýsing av trimum av teimum 47 játtaðu verkætlaðunum, sum fingu játtað stuðul í 2014. Tað eru fleiri og áhugaverdar verkætlanir játtaðar, men tær eru m.a. vardar av upphavsrætti og verða tískil ikki lagdar fram fyri almenninginum fyrr enn patent v.m. er avgreitt, ella tá vøran er komin á marknaðin.

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## VERKÆTLAN 1

**Umsøkjari**: Soul Made til messuluttøku í Eiffeltorninum í París.

**Lýsing**: Beinta Poulsen eigur fyritøkuna Soule Made, sum hon hevur rikið síðani 2005. Soul Made verður marknaðarført sum eitt føroyskt klædnamerki, har íblásturin kemur úr Føroyum, bæði tí vøkru náttúruni og bindisiðvenjuni í Føroyum. Tað hevur eydnast Beintu Poulsen at fáa Soul Made inn á 10 ymiskar marknaðir.

**Stuðul**: Vinnuframi játtaði 27. august 2014 at stuðla Soul Made til luttøku í mótasýningini í Eiffeltorninum.

**Endamál**: Tað hevur týdning fyri Soul Made at fáa kundar uttanfyri landoddarnar, tí var luttøkan í *World's Most Iconic Catwalk J Autumn Fashion Show on the Eiffel Tower in Paris*, fyriskipað av J Model Management, ein møguleiki av álvara at gera vart við seg. J Model Management hevur fyrr skipað fyri heldur øðrvísi mótasýningum, m.a. á Tower Bridge í London, í torninum SkyBridge í Kuala Lumpur í Malaysia, umborð á skipinum Costa Atlantica í Dubai, í Grand Canyon og World Trade Center í USA. Nógv tíðindafólk úr øllum heiminum hava verið við til hesar hesar mótasýningar, og tað var við hesum í huga, at Soul Made, við stuðli frá Vinnuframa, avgjørdi at luttaka á júst hesari mótasýningini í Eiffeltorninum í París.

**Úrslit**: 31. oktober 2014 var mótasýningin í Eiffeltorninum. Til staðar vóru 200 tíðindafólk, sniðgevar og VIP gestir úr Fraklandi, tá Soul Made sýndi fram føroyskt sniðgivnu heyst og vetrar kollektiónina. Eftir mótasýningina hevur verið skrivað um Soul Made í altjóða forritum sum Marie Claire, Cosmopolitan og Elle. Umframt umtalu, hevur Soul Made fingið nýggj útlendsk sambond og samstarv. Sum ein beinleiðis avleiðing av luttøkuni á mótamessuni, hevur Soul Made nú víðkað um sítt virksemi.

**Stuðulskipanir, ið søkt var ígjøgnum**: Soul Made søkti um stuðul gjøgnum stuðulsskipanina 04 Søla, sum er stuðul til sølufremjandi tiltøk, ið kunnu fremja føroyskan útflutning.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### VERKÆTLAN 2

**Umsøkjari**: Leif Sørensen til verkætlanirnar fiskakips og alkoholiskur urtadrykkur.

**Lýsing**: Leif Sørensen er kokkur og hevur serliga lagt seg eftir at gera mat úr føroyskum rávørum. Fiskakipsini hevur Leif Sørensen brúkt sum ískoyti til matgerðina, men tað hevur tó ongantíð áður verið við framleiðslu í huganum, at hann hevur gjørt kipsini. Urtadrykkurin er úr føroyskum urtum og hesin skal eisini mennast til framleiðslu.

**Stuðul**: Vinnuframi játtaði 28. februar 2014 stuðul til báðar verktætlanirnar hjá Leif Sørensen

**Endamál**: Leif Sørensen hevur áður gjørt fiskakips í smærri nøgdum, men um kipsini skulu framleiðast, so er neyðugt við eini nýggjari uppskrift, einum framferðarhátti til størri mongdir og pakning, sum hóskar seg.
Urtirnar til alkoholiska drykkin skuldu hentast og viðgerast, so tað kundi framleiðast til ein ella fleiri drekkiligar løgir.
Endamálið við báðum verkætlanunum var at finna íleggjarar, so hesar slóðbrótandi verkætlanir kundu fremjast í verki, gerast klárar til marknaðin og seljast sum vørur.

**Úrslit**: Fiskakipsini eru væl dámd, og eftirspurningurin er stórur. Kipsini vunnu gull, tá Leif Sørensen luttók við teimum í einari kapping í Íslandi í november 2014. Enn hevur tað ikki eydnast at finna tann endaliga framleiðsluháttin, til stórar mongdir, sum eru á einum rímuligum kostnaðarstøði, tí verður framhaldandi arbeitt við hesum í einari nýggjari verkætlan, sum eisini er stuðlað av Vinnuframa.
Til alkoholisku urtadrykkirnar hevur Leif Sørensen savnað 50 ymiskar plantur og tarasløg og gjørt 150 ymiskar royndir og hevur við hesum staðfest, at tað eru stórir menningarmøguleikar í hesari verkætlan.
Leif Sørensen arbeiðir eisini víðari við hesari verkætlan við stuðli frá Vinnuframa.
Útlitini eru góð. Longu nú hava alkyns tíðindafólk úr øllum heiminum víst áhuga fyri verkætlanunum hjá Leif Sørensen.

**Stuðulskipanir, ið søkt var ígjøgnum**: Leif Sørensen søkti stuðul gjøgnum stuðulskipanina 03 menning, sum er stuðul til átøk, ið kunnu skapa vinnuligan vøkstur.

## VERKÆTLAN 3

**Umsøkjari**: Green IQ til luttøku á messu við laksalúsaskiljara á alimessu í Tróndheimi.

**Lýsing**: Green IQ er ein fyritøka, sum hevur heimstað í Kollafirði og smiðju í Hvalvík. Felagið hevur fýra eigarar, har tríggir av teimum arbeiða fyri felagið. Seinasta árið hevur eitt fólk verið í føstum starvi, umframt hesum eru nakrir handverkarar knýttir at felagnum eftir tørvi.
Green IQ hevur, við stuðli frá Vinnuframa, undanfarin ár eisini ment og fingið patent uppá ein oljuútskiljara. Hesin oljuskiljari er víðariútviklaður, soleiðis at hann í dag kann súgva laksalús upp, ið flóta oman á vatnskorpuni og skilja tær burturúr. Lúsaskiljarin vann heiðurin sum ársins innovatión á íverksetaradegnum, sum varð hildin í Klaksvík 27. mars 2015.

**Stuðul**: Vinnuframi játtaði 30. oktober 2014 at stuðla luttøku á alimessu við lúsaskiljaranum hjá Green IQ

**Endamál**: Tað hevur stóran týdning hjá Green IQ at fáa samband við málbólkin og fáa útlendskar kundar, tí er Alimessan í Tróndheimi í 2015 eitt gott høvi hjá fyritøkuni at vísa vøruna og skapa varandi sambond við endabrúkaran. Ongin onnur vøra á marknaðinum kann samanberast við lúsaskiljaran hjá Green IQ, sum teir hava fingið patent uppá, tí Green IQ hevur ment eina vøru, ið kann samanberast við ein súgvara, og verður hann brúktur, tá laksurin verður viðgjørdur við hydrogenperoxid, tá lúsin er doyvd, verður hon sogin oman av vatnskorpuni.

**Úrslit**: Green IQ hevur enn ikki luttikið á messuni, sum verður í august 2015, tí er trupult at meta um, hvat fer at koma burtur úr luttøkuni. Stuðulin frá Vinnuframa hevur tó víst seg at hava styrkt ungu fyritøkuna, sum í dag hevur ment ikki minni enn tvær vørur, umframt at hava fingið patent uppá tær, tí eru vónirnar góðar fyri luttøkuni á messuni, tí laksalúsin hevur víst seg at vera ein kostnaðarmikil avbjóðing hjá fleiri laksaalaraum, ikki bert hjá teimum føroysku.

**Stuðulskipanir, ið søkt var ígjøgnum**: Green IQ søkti í 2014 um stuðul gjøgnum stuðulskipanina 04 søla, sum er stuðul til sølufremjandi tiltøk, ið kunnu fremja føroyskan útflutning. Undanfarin ár hevur Green IQ m.a. eisini søkt um stuðul til patent.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### Hagtøl

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis seinastu seks árini (í túsund krónum):




| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 1.800 | 667 | 258 | 25 | 198 | 239 | 2.731 |
| Menning | 1.341 | 719 | 885 | 704 | 198 | 1.224 | 5.269 |
| Marknaðarføring | 2.563 | 2.057 | 1.109 | 1.522 | 1.492 | 1.302 | 10.045 |
| Aðrar | 215 | 337 | 434 | 235 | 250 | 1.195 | 3.194 |
| | **5.919** | **3.780** | **2.686** | **2.486** | **2.408** | **3.960** | **21.239** |

Samlað fyri árini 2009-2014 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:

